






*Stórur áhugi var fyri Toyota Prius, ið er ein av heimsins mest framkomnu og umhvørvisvinarligu bilum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Toyota Prius II:

# Hybridbilur við tveimum motorum

**Stórur áhugi var fyri einum av heimsins mest framkomnu og umhvørvisvinarligu bilum, Toyota Prius, á Copenhagen Motor Show 2004. Bilurin hevur tveir samanbygdar motorar, annar bensin og hin el-drivin**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Toyota Prius hevur verið á marknaðinum síðan 1997, men fyrst nú er hann komin til Danmarkar. Orsøkin er, at danska stjórnin ikki hevur vilja givið hesum umhvørvisvinarliga bilinum avgjaldslætta. Á fólkatingi verður nú arbeitt við einum lógaruppskoti, har umhvørvisvinarligir bilar fáa stóran avgjaldslætta. Um uppskotið kemur ígjøgnum, fer ein Prius sum kostar 429.550 krónur í dag einans at kosta 268.825 krónur.

Spennandi verður um uppskotið kemur ígjøgnum í fólkatinginum og hvussu føroysku myndugleikarnir fara at handfara eitt slíkt uppskot, tá bilurin kemur hendan vegin í juni.

Toyota Prius er ein bilur við tveimum samanbygdum motorum, sum supplera hvønn annan. Bensinmotorurin er ein 4 syl. við 115 hk, meðan el-motorurin hevur 68 hk.

Hybridkonseptið virkar soleiðis, at bensinmotorurin og el-motorurin supplera hvønn annan og syrgja fyri at bilurin altíð koyrir optimalt, bæði hvat kraft, økonomi og umhvørvisvernd viðvíkur.

Battaríini, sum liggja í dúrkinum, geva streym til elmotorin og verða lødd upp av bensinmotorinum. Fyri at bilurin ikki skal verða ov tungur, er stórur partur av plátulutunum gjørdir úr aluminium.

Prius hevur elektroniskt »start & stop«, t.v.s. at tá bilurin stendur stillur, steðgar motorurin og startar aftur, tá bilførarin traðkar á spitaran. Girstongin, er eitt lítið elektroniskt joystick í instrumentborðinum. Bilurin hevur allar tær vanligu elektronisku trygdar- og hjálparskipanirnar, sum eru í nútímans bilum.

Bæði FDM / Motor og Motor-Magasinet hava royndarkoyrt bilin, ið er sera ljóðleysur at koyra, serliga tá hann koyrir við el-motorinum, men eisini við bensinmotorinum.

Toyota er av tí fatan, at hybridtøknin er eitt tað mest realistiska boðið uppá ein optimalan umhvørvisvinarligan familjubil.

## Toyota Orius II Hybrid

| | |
|---|---|
| Motorur I | 1,5 litur 4 syl bensin 78 hk |
| Motorur II | El-motorur við 68 hk |
| 0-100 km/t | 10,9 sek |
| Bensinnýtsla | 23,3 km/l (blandað koyring) |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 445,0 cm |
| Breidd | 173,0 cm |
| Hædd | 149,0 cm |
| Eginvekt | 1300 kg |
| Prísur | umleið kr. 330.000,- |
| Søluumboð: | Reyni Service<br>Vegurin Langi<br>FO-188 Hoyvík<br>Tel. 353040<br>www. reyniservice.fo |



*Toyota Prius er ein bilur við tveimum samanbygdum motorum, sum supplera hvønn annan. Bensinmotorurin er ein 4 syl. við 115 hk, meðan el-motorurin hevur 68 hk* *Mynd. Álvur Haraldsen*



*Á instrumentborðinum er ein skíggi, sum t.d. vísir hvør av motorunum er í brúk* *Mynd: Álvur Haraldsen*



# Sjey persóna Corolla Verso í juni

**Verso eru MPV útgávurnar hjá Toyota. Ein nýggjur Corolla Verso var á Copenhagen Motor Show í Bella Center. Bilurin, ið serliga er ætlaður til evropeiska marknaðin, kemur á danska og føroyska marknaðin í juni**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Málið hjá Toyota við nýggja Corolla Verso var at gera ein tann mest fleksibla MPV-bilin í sínum klassa í besta kvaliteti og í evropeiskum stíli. Tað sær út til at hava eydnast teimum at náa sítt mál, tí bilurin er sera brúkaravinarligur við ikki minni enn 32 ymiskum kombinatiónsmøguleikum við setrunum, og at síggja til kundi bilurin fyri tað verið evropeiskur.

Talan er um ein MPV við upp til sjey sitiplássum og sera liðiligari innrætting, har øll fimm baksetrini kunnu leggjast niður, soleiðis at viðførisrúmið verður heilt slætt.

Bilurin fæst í útgávum við fimm ella sjey sitiplássum og trimum ymiskum motorum: 1,6 litur bensin við 110 hk, 1,8 litur bensin við 129, og ein 2,0 litur D-4D diesel við 116 hk. Hann fæst eisini við M-MT girkassa, sum eisini virkar sum automatgir.

Instrumentini eru í Lexus stíli, og alt innan er í nýggjasta móta og í gjøgnumførdum kvaliteti. Bilførarin situr høgt og útsýnið er gott allar vegir. Rattið kann stillast allar vegir, og skjótt er finna seg væl til rættis í bilinum. Viðvíkjandi útgerð fæst bilurin í útgávunum Terra og Sol.

Toyota hava stórar ætlanir við bilinum, sum serliga er ætlaður til evropeiska marknaðin. Teir rokna við at selja yvir 60.000 Corolla Verso í Evropa í 2004.

Bilurin er teknaður á designteknistovuni hjá Toyota í Suðurfraklandi og kemur á føroyska marknaðin í juni.




*Toyota Corolla Verso er ein elegantur MPV við upp til sjey sitiplássum og sera liðiligari innrætting*





*Bilurin er sera brúkaravinarligur við nógvum ymiskum kombinatiónsmøguleikum við innrættingini* *Mynd: Álvur Haraldsen*

## Toyota Corolla Verso 1,8

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1,8 litur VVT-i bensin 129 hk |
| 0-100 km/t | 10,8 sek |
| Bensinnýtsla | 13,0 km/l |
| Dekkstødd | 205/55-16 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 436,0 cm |
| Breidd | 177,0 cm |
| Hædd | 162,0 cm |
| Eginvekt | 1325kg |
| Prísur | umleið kr. 250.000 |
| Søluumboð | Reyni Service<br>Vegurin Langi<br>FO-188 Hoyvík<br>Tel. 353040<br>www.reyniservice.fo |



*Smart design. Málið hjá Toyota við nýggja Corolla Verso var at gera ein tann mest fleksibla MPV-bilin í sínum klassa* *Mynd: Álvur Haraldsen*



*Instrumentini eru í Lexus stíli, og alt innan er í nýggjasta móta og í gjøgnumførdum kvaliteti* *Mynd: Álvur Haraldsen*